# Álit

# í

**Løgtingsmáli nr. 54/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting (Leingja fyrningarfreistina í málum um transfer pricing)**

Kristina Háfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 2. november 2018, og eftir 1. viðgerð 20. november er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. og 29. november og 2018.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. november 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Sambært galdandi lóggávu er fyrningarfreistin fyri skattaálíkningar 3 ár. Henda freistin er galdandi fyri allar álíkningar, og sostatt eisini fyri álíkningar hjá feløgum, ið eru fevnd av reglunum um transfer pricing.

Mælt verður í uppskotinum til, at fyrningarfreistin fyri skattaálíkningar í málum um transfer pricing verður longd úr trimum upp í fimm ár.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Ruth Vang<br>formaður | Bárður Nielsen<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |